# Tvørafólk brúk fyri meiri pengum

**Tað gongst illa at fáa stovnar og fyritøkur atstuða stóru norðurlendsku róðrar- og mentanarstevnuni, sum verður á Tvøroyri í summar**

PENINGANEYÐ
*Áki Bertholdsen*



*Í summar verður stór, norðurlendsk róðrar- og mentnarstevna á Tvøroyri, men tað knípur at fáa fígging ogfyrireikararnir vóna eisini, at fólk vilja hýsa gestum hesar dagarnar. Her fer Naddoddur eftir fjørðinum við flaggi afturi í rong, óivað verður hann eisini eitt prýði fyri stevnuna*

Tvøroyri: Tað gongst avbera illa at fáa fígging til tað stóru norðurlendsku róðrar- mentanarstevnuna, sum verður á Tvøroyri í summar.

Jonny Dimon á Suðuroyar Kunningarstovu, sum samskipar stevnuna, sigur, at tey hava sent eina ørgrynna av brøvum bæði til kommunur í Suðuroynni, umframt til stovnar og fyritøkur ymsastaðni í landinum, men enn hevur úrtøkan verið sera soltin.

Fleiri hava svarað umbøn okkara aftur, men tíverri hava øll svarini verið noktandi, sigur hon.

– Annars samtykti Tvøroyrar Kommuna í fjør at stuðla tiltakinum við 100.000 krónum. Men umframt tað, er tað bara ein kommuna, sum hevur játtað at stuðla tiltakinum og tað eru vit sera takksom fyri.

### Yvir 200 fólk

Hon vónar tó, at fleiri fara at lata frætta frá sær sum frá líður, tí talan er um eitt rættiliga stórt tiltak, sum kostar nógvan pening at fyriskipa og stuðulin, sum fyribils er fingin til vega, strekkir verri enn so til, tí talan er um eitt rættiliga stórt og umfatandi tiltak.

– Fyribils hava yvir 200 fólk úr Hetlandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Finnlandi meldað til. Men tilmeldingarfreistin er ikki úti enn, og vit vænta nakað av fólki afturat, eitt nú úr Íslandi og kanska eisini grønlendingar, sigur Jonny Dimon, tí tað eru nógv, sum hava boðað frá áhuga. Harumframt eru fitt av fólki væntandi ymsastaðni úr Føroyum.

### Mangla gisting

Í Suðuroy er ikki so nógv hotellpláss, so ætlanin er fyri ein part, at fólk eisini skulu gista í skúlunum í Tvøroyrar Kommunu.

Men talan er fyri ein part um eldri fólk, sum eru farin um tann aldurin, har tey liggja væl í einum soviposa á gólvinum.

Tí heitir Jonny Dimon á fólk um um at siga frá, um tey vilja hava onkrar gestir hesar dagarnar, stevnan er. Hon vónar, at fólk kundi havt áhuga í at havt tað, sum nevnist ból og biti", har gestirnir fáa song og morgunmat fyri einar passaliga upphædd, tað sum aðrastaðni eitur Bed and Breakfast.

– Vit hava stórligabrúk fyri fleiri gistingarmøguleikum, so bónandi bjóða fólk seg fram at hýsa fólki hesara dagarnar, tí tað hevði komið sera væl við.

### Róðrar og mentanarstevna

Hendan Róðrar- og Mentanarstevna, sum talan er um, verður á Tvøroyri í døgum frá 9.-11. august undir heitinum "Nordisk Ro- og Kulturtræf.

Endamálið við stevnuni er júst at menna áhugan fyri føroyska bátinum. Eydnast stevnan á Tvøroyri væl, er ætlanin at skipa fyri slíkum stevnum í onkrum av hinum londunum eina aðru ferð, um hugur er til tess og at gera hetta til ein fastan tátt í norðurlendska samstarvinum, kanska annaðhvørt ár.

Á stevnuni er kappróður við føroyskum bátum ímillum manningar úr teimum ymsu norðurlondunum. Men ætlanin er eisini at vísa fram útlendskar bátar og tað er eisini ætlanin at grønlendingar koma hendavegin at vísa fólki kynstrið at rógva í kajakk.

Men tað er ikki bara kappróður á stevnuni, tí á skránni verður eisini ein hópur av mentanarligum tiltøkum av ymsum slagi



# Fleiri umvælingar enn væntað

**Smyril sleppur ikki í dokk mánadagin, sum ætlað, tí í løtuni er Dúgvan til umvælingar og tær gjørdust drúgvari enn væntað**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Suðuroyingar mugu nú venja seg við, at Smyril ikki longur hevur tann svarta litin, teir hava verið vanir við í fleiri mannaminni. Tá ið teir síggja Smyril aftur, verður hann bláur*

Hetta er tíðin, tá ið Strandferðslan plagar at fáa skipini í beding og á dokk til umvælingar. So er aftur í ár, men tíverri noyðist Strandferðslan at ásanna, at ætlanin, sum varð løgd fyri hesar umvælingar, kemur ikki at halda.

Í løtuni er Dúgvan til umvælingar á Skála og mánadagin skuldi Smyril standa fyri tørnið.

Men tað er greitt, at Smyril sleppur ikki í dokk mánadagin sum ætlað.

– Skipini eru gomul og tá ið arbeiðið uppá tær fyrst er byrjað, vísir tað seg mangan, at meiri er at gera, enn væntað, sigur Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni.

Hann sigur tí, at Dúgvan verður eina viku seinkað av beding og tástaðni sleppur Smyril í dokk, so tað verður ikki, fyrrenn næsta mánadag, 13. mai, at Smyril sleppur framat.

Tekniski leiðarin sigur, at tað serliga var á landgongubrúnni, at fleiri umvælingar vóru, enn roknað varð við. Men harafturat skuldi skipið málast og tað hevur viðrað illa til tað, so alt í alt verður skipið seinkað av beding.

Summi hava hildið, at tað átti at borið til at koyrt Smyril á beding ímeðan verkfall er og hann liggur kortini við bryggju.

### Men tað ber ikki til

Magnus Magnussen sigur, at tað ber ikki til at broyta ætlanir, sum eru lagdar.

– Eitt verkfall kann enda, áðrenn vit vita av og tá má skip verða tókt. Stóð Smyril tá á beding, hevði onki skip verið, sigur hann. Arbeiðið á skipasmiðjuni er eisini lagt til rættis og tað ber ikki til at broyta tað gongdina.

### Ongar avleiðingar

Eftir ætlan skuldi Smyril vera í dokk í smáar tvær vikur. Hann skuldi fara í dokk mánamorgun og verða klárur aftur til fríggjakvøldið í vikuni eftir, tann 17. mai.

Hóast verkfall er, verður ongin trupulleiki at fáa Smyril í dokk, tí hóst ongir navigatørar eru at sigla av verkfalli, ber til at sleipa hann inn á Skála.

Ímeðan Dúgvan og Smyril eru til umvælingar, er tað estlendska ferjan, Scania, sum røkir ferðasambandið.

Og tað er heldur ongin neyð við Scaniu, tí Strandferðslan hevur leigað hana til 26 mai, men hevur rætt til at leiga hana í 14 dagar afturat, so stendur á, kann hon verða í Føroyum til einaferð í juni mánað.

Men tá ið Smyril so kemur aftur í sigling, verður talan um eitt munandi nossligari skip. Umframt at bógskrúvuna og annað skal kannast eftir kravi frá sýninum, skulu teppi og gardinur, skiftast, nýggj flúgvarasetur setast í og skipið yvirhøvur hampast innan, so at tað verður hugaligari hjá ferðafólki, sigur Magnus Magnussen.

Og so eitt afturat: Hann skal eisini málast, og tað verður í tí nýggja litinum hjá Strandferðsluni, so tá ið suðuroyingar síggja Smyril aftur, mugu teir venja seg við, at hann er bláur. Og nú Smyril er málaður, hava øll strandfaraskipini fingið tann nýggja, bláa litin.



# Mortan verður nú útróðrarmaður burturav

**Í gjár yvirtók Mortan Johannesen útróðrarbátin »Tvíburðar«, sum AWI BOATS í Runavík hevur bygt til hansara. – Mær dámar ógvuliga væl lívið sum útróðrarmaður, sigur fyrrverandi skiparin og vinnulívsmaðurin**



*Mortan Johannesen saman við soninum, Andriasi, umborð á nýggja útróðrarbátinum, »Tvíburðar«*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tveir sera snotuligir glastrevjabátar hava seinastu dagarnar ligið við bryggjuna frammanfyri Mekanik í Runavík. Skrokkarnir eru teir somu, AWI STAR 35, men við fyrsta eygnabráð líkjast bátarnir ikki heldur enn kópur og veðragjólingur. Annar, sum er bygdur til sigling við fólki í Grønlandi, er partvís innilokaður omandeks. Hin er bygdur til Mortan Johannesen og er útgjørdur sum fiskibátur burtur av.

Báturin hjá Mortani hevur fingið navnið »Tvíburðar« og varð yvirtikin í gjár, fríggjadagin.

Vit fregnaðust hjá Mortani, hvaðani hann hevur navnið »Tvíburðar«.

– Jú, sonur mín, Andrias, hevði verið giftur í níggju ár, áðrenn hann og konan fingu nakað barn. Og tá ið so nakað spurdist burtur úr í so máta, fingu tey bæði tvíburðar. Tí hevur báturin fingið hetta kanska heldur sjáldsama navn, sigur Mortan Johannesen.

Spurdur, hví hann hevur valt at yvirtaka bátin ein fríggjadag, sigur fyrrverandi skiparin og vinnulívsmaðurin, at hann hevur altíð trúð uppá fríggjadag, og tí vildi hann yvirtaka henda snotuliga bátin ein fríggjadag.

– Eg havi einki ímóti at trúgva uppá tað, sum eingin annar trýr uppá, sigur Mortan og smílist.

### Væl nøgdur

Mortan er sera fegin um bátin, sum AWI Boats hevur bygt honum.

– Hetta er ein broyttur Aqua Star. Hann er ein slakan metur longri, enn Aqua Star bátarnir vóru og nakað breiðari aftan.

Báturin hjá Mortani er 35 føtur langur; hann hevur eina 360 hk. Volvo maskinu og gongur 20 míl.

Í lastini er pláss fyri 12 kørum, sum eru 380 litrar hvørt. Hesi standa við síðuna av hvørjum øðrum. Fiskurin í kørunum verður niðurkøldur við ísi og sjógvi ella ískræpa.

– Hetta ger, at bestu umstøður eru til góðan fisk, sigur Mortan.

Dekkið á »Tvíburðum« er 18 fermetrar stórt. Báturin hevur 5 íslendskar snellur, og í summar fær báturin eisini línuspæl.

– Nú havi eg ikki fingist við línu, men ætlanin er, at Andrias skal rógva við línu í summar og í heyst, tá ið hann hevur frí.

Andrias er annars skipari á Fuglfirðingi.

Mortan sigur, at báturin hevur ein sonevndan brennioljukomputara, sum eitt nú vísir, nær tú siglir við tí mest økonomisku ferðini.

– Hesin komputarin er bundin saman við gpsaranum. Fert tú t.d. t á Føroya Banka, kanst tú síggja, hvussu nógva olju tú brennur á túrinum, og nær tú siglir mest økonomiskt.

### Leingist út á hav

Síðan Mortan gavst sum vinnulívsmaður fyri einum ári síðan, hevur honum longst aftur til sjós, og hesa tíðina hevur hann róð út við einum AWI 27 báti, sum bróðurin eigur.

– Eg eri 59 ára gamal og ælti mær nú at vera útróðrarmaður burtur av, tí mær dámar hetta lívið so ómetaliga væl. Bátin, sum eg nú havi latið byggja, eri eg sera fegin um, og eg gleði meg at sleppa at rógva út við honum, sigur Mortan Johannesen.

Vit kunnu leggja aftrat, at í lugarinum á »Tvíburðum« er gassbluss, kabúss, kuldaskáp, tvær koyggjur og tveir breiðir benkrir ella tilsamans fýra sovipláss.

AWI STAR 35 er í allar mátar ein sera snotuligur og rúmligur útróðrarbátur, sum bæði í dygd og prísi er kappingarførur við allar aðrar bátar av somu stødd.




*Tveir sera snotuligir glastrevjabátar frammanfyri Mekanik í Runavík. Skrokkurin er hin sami, men omandeks líkjast bátarnir ikki*

# Merkist ikki á Eiði, men í Sørvági og Klaksvík

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á Norðís Seafood á Eiði hava tey higartil í ár havt nóg mikið at gera, men nú er líkt til, at heldur minni fiskur er á marknaðinum. Enn hevur hetta tó ikki bilað, og arbeiði hevur verið hvønn dag á virkinum, men óvist er, hvussu verður komandi dagarnar.

– Vit keypa onga heila last, og vit landa ongan bát her norðuri. Allur fiskurin, sum verður arbeiddur, verður keyptur um uppboðssøluna, siga tey á Eiði.

### Merkist í Klaksvík og Sørvági

Norðís Seafood arbeiðir í neyvum samstarvi við saltfiskavirkini, Sammut í Klaksvík og Vestís í Sørvági.

– Vit hava lítið og einki merkt til verkfallið her norðuri, men bæði í Klaksvík og í Sørvági kemur verkfallið illa við, tí eingin fiskur kemur av meginlandinum.

Á Norðís Seafood arbeiða tey serliga línufisk, og tí merkist tað á rávørutilgongdini, tá ið vánaligt veður og vánaligur streymur er.

– Vit hava havt nóg mikið at gera, og nú fáa vit at síggja, hvussu verður næstu dagarnar, siga tey á Norðís Seafood.